# Tórfinn kostaði okkum dýrt

**Elin Lindenskov er sannførd um, at hon varð revsað av veljarunum í samband við innanhýsis stríðið millum seg og Tórfinn Smith í Javnaðarflokkinum. - Høvdu vit verið stríðið fyriuttan høvdu vit havt góðar møguleikar at fingið trý umboð í býráðið, sigur hon**

VALIÐ 04
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*


*– Eg haldi fyrst og fremst, at eg eri revsað fyri stríðið, sum hevur verið millum meg og Tórfinn, men eg kann so fegnast um, at eg gjørdist sigursharrin okkara millum á valinum hesaferð*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Hann hevur gjørt eitt ótrúligt arbeiði fyri Javnaðarflokkin gjøgnum tíðina, men eg haldi tað ber væl til at siga, at Tórfinn kostaði okkum dýrt á valinum hesaferð. Høvdu vit verið stríðið fyriuttan høvdu vit havt góðar møguleikar at fingið trý umboð í býráðið, og tað hevði eisini betra munandi um møguleikarnir at koma í meirilutan

Elin Lindenskov hevur framvegis ikki lagt stríðið millum seg og fyrrverandi partamannin í Tórshavnar býráð, Tórfinn Smith, aftur um seg. Elin fekk persónliga lakasta býráðsvalið síðan 1992. Á býráðsvalinum hesaferð fekk hon 238 atkvøður, og tað er ein afturgongd á slakar 150 atkvøður sammett við valið í 2000.

– Eg haldi fyrst og fremst, at eg eri revsað fyri stríðið, sum hevur verið millum meg og Tórfinn, men eg kann so fegnast um, at eg gjørdist sigursharrin okkara millum á valinum hesaferð. Sjálvandi hevur tað eisini spælt ein leiklut, at Javnaðarflokkurin hesaferð hevur havt ein sterkan lista við nógvum kvinnuligum valevnum, sum eisini hevur havt við sær, at eg misti nakrar atkvøður, sigur Elin Lindenskov.

### Sum ein kvinna

Elin Lindenskov hevur verið ein av oddakvinnunum í stríðnum at fáa kvinnur at gerast virknari í føroyskum politikki, og hon fegnast, sum verða man, um mongu kvinnurnar, sum vórðu valdar í Tórshavnar býráð hesaferð.

– Eg eri ótrúliga glað, at Javnaðarflokkurin hevur fingið tvey kvinnulig umboð í býráðið. Av fimm teimum fremstu valevnunum hjá okkum vóru hesaferð fýra kvinnur, og tað kennist ómetaliga væl. At fleiri kvinnur eru valdar á hinum listunum er eisini gott, tí endiliga eru vit við at nærkast javnstøðu í Tórshavnar býráð, sigur hon

Spurd um vit kunnu vænta ein Javnaðarflokk, sum fer at standa saman í Tórshavnar býráð komandi árini, svarar Elin brosandi, at flokkurin fer at standa saman sum ein kvinna.

Vit royndu at fyrrapartin mikudagin at fáa fatur á Tórfinn Smith, men tað eydnaðist tíverri ikki.

## UTTAN ÚR HEIMI

# Hann slapp til rýmingar

**Amerikanararnir hava hildið, at yvirgangsmaðurin Abu Musab al-Zarqawi fjaldi seg í Fallujah, men nú halda teir, at hann slapp til rýmingar, áðrenn álopið á býin byrjaði**

IRAK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*


*Jordanski yvirgangsmaðurin Abu Musab al-Zarqawi slapp eftir øllum at døma úr Falluja, áðrenn amerikanaranir lupu á býin*

Nógv bendir á, at tað eydnaðist yvirgangsmanninum Abu Musab al-Zarqawi at sleppa úr Fallujah, áðrenn amerikanskir og irakskir hermenn fóru undir álopið á býin mánadagin.

– Vit halda, at hann er sloppin úr býnum, segði amerikanski generalurin Thomas Metz í gjár, og seinni søgdu aðrar keldur við sjónvarpið CNN, at teir trúgvastu stuðlarnir hjá al-Zaeqawi helst eisini sluppu úr býnum, áðrenn álopið byrjaði.

Tann stóri spurningurin hjá amerikonsku herleiðsluni í Irak er nú, hvar al-Zarqawi og menn hansara eru. Eingin er í iva um, at bólkurin hjá al-Zarqawi hevur skipað fyri teimum flestu atsóknunum at amerikonskum og øðrum málum í Irak, og summir eygleiðarar halda, at álopið á Fallujah kann hava styrkt bólkin.

Sambært tíðindastovuni AP bendir nógv á, at uppreistrarmenninir eru í ferð við at fyrireika seg til álop aðrastaðni í Irak, meðan amerikanarararnir berjast í Fallujah. Sagt verður, at nógvir uppreistrarmenn hava verið at síggja í býunum Ramadi og Hit seinastu dagarnar, og bardagar hava eisini verið í býunum Mosul og Haditha.

Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, segði mánadagin, at tað er ikki óhugsandi, at herurin fer at halda fram við álopum á aðrar býir, tá Fallujah er tikin. Serfrøðingar siga, at hetta kann enda sum tann væl kenda søgan um kettuna og músina.

# Útlendingar rýma úr Danmark

**Ongantíð síðani 1980 hava so nógvir útlendskir ríkisborgarar valt at fara úr Danmark sum nú**

DANMARK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Mánaðarnar juli, august og september í ár fluttu næstan 5.600 útlendskir ríkisborgarar úr Danmark. Tað eru góð tíggju prosent meiri enn somu mánaðir í fjør og tað mesta í einum ársfjórðingi seinastu 24 árini, sigur danska hagstovan.

Tað er ikki greitt, hví so nógvir útlendingar fara úr Danmark, men í Rådgivningscentret for Racediskrimination halda tey, at tað nógva tosið um trupulleikar av innflytarum hevur fingið nógvar útlendskar ríkisborgarar at kenna seg illa í Danmark. Stovnurin er í løtuni í ferð við at kanna hesi viðurskiftini hjá útlendskum læknum, verkfrøðingum og øðrum, sum eru komnir til Danmrkar at arbeiða sum granskarar.

Hagtølini vísa eisini, at fleiri danskir ríkisborgarar velja at fara úr Danmark nú enn fyrr. Í juli ársfjórðingi fluttu næstan 9.700 danskir ríkisborgarar av landinum, samstundis sum talið á donskum ríkisborgarum, sum velja at flyta úr útlondum til Danmarkar, er minkað.

Nú búgva 5.408.716 fólk í Danmark. Av teimum eru 450.250 innflytarar ella eftirkomarar hjá innflytarum ella 8,3 prosent av fólkatalinum. Triði hvør innflytari er danskur ríkisborgari.



# Smyril Line og Fjord Line samráðast

**P/F Smyril Line og Fjord Line AS møguliga at samskipa ferjuvirksemið hjá báðum feløgum**

FLUTNINGUR
*Jákup Mørk*



*Smyril Line og Fjord-Line samráðast í løtuni um eitt møguligt framtíðar samstarv*

Í tíðindaskrivi, sum fyritøkurnar báðar hava sent út, verður sagt, at tvinnar orsøkir eru til samráðingarnar.

Partvíst rokna feløgini við, at eitt samstarv kann føra við sær, at skipini hjá feløgunum báðum í størri mun kunnu gagnnýtast. Hartil ger eitt samstarv, at feløgini við fleiri skipum verða minni sárbar í rakstrinum.

Rationaliseringar eru sjálvsagt eisini millum málini, sum feløgini royna at røkka við hesum, eins og marknaðarføringin kann gerast bæði breiðari og miðvísari.

Sagt verður annars í tíðindaskrivinum, at samráðingarnar fara fram undir teirri fortreyt, at samstarvið tryggjar feløgunum ein sterkan búskaparligan grundvøll, sum er í samsvari við virksemið hjá feløgunum.

Samstarvandi feløgini fara at hava tilsamans umleið 800 starvsfólk, 5 skip, ein árligan umsetning uppá umleið 1 milliard og fara árliga at flyta 700.000 ferðafólk.

Í tíðindaskrivinum verður at enda sagt, at feløgini miða eftir, at nærri samstarvskarmar verða settir sum skjótast, samstundis sum ein tíðarætlan verður gjørd fyri tí framhaldandi tilgongdini.

# Ókeypis frukt til starvsfólk

TÍÐINDASKRIV
*kelda: www.sparikassin.fo*

Nakrar av privatkundadeildunum hjá Føroyar Sparikassa bjóða starvsfólkunum ókeypis frukt, og sum heild er undirtøkan góð.

Ein av deildunum hjá Sparikassanum, sum hava hesa skipanina, er Deild Tórshavn, har starvsfólk fáa ókeypis frukt fýra dagar um vikuna.

– Vit ynskja, at starvsfólk okkara hava tað gott, og skipanin við morgunfrukt er ein partur av starvsfólkarøktini. Fruktin er sunn og eitt gott alternativ ella ískoyti til kaffi og te og franskbreyð, sigur Øssur Skeel Nolsøe, økisleiðari í Føroya Sparikassa.

Sum skilst er skipanin sera vælumtókt millum starvsfólkini.

Øssur Skeel Nolsøe sigur, at hann kann avgjørt mæla øðrum arbeiðsgevarum at royna hetta. Starvsfólkini eru, sambært honum, glað fyri tað.

– Fruktin er sunn, og hvør veit, um skipanin ikki kann kvinka talið av sjúkradøgum niður, sigur hann men leggur tó dent á, at hetta við sjúkradøgum ikki er orsøk til, at fruktskipanin er komin.

**- sae -**




**KPMG broytir navnið til SPEKT**

Av praktiskum grundum hava vit valt at broyta okkara tilknýti til KPMG-International frá fullum limaskapi til eitt leysari tilknýti. Nýggja tilknýtið kallast "Corresponding firm to KPMG International, a Sviss Corporate".

Broytingin er galdandi frá 1. januar 2005.

Størsti parturin av okkara uttanlandssamskifti er við ella umvegis Danmark og hini Norðurlondini. Vit hava eina serliga samstarvsavtalu við KPMG í Danmark, sum heldur fram óbroytt.

Felagið verður frá 1. januar 2005 rikið undir navninum SPEKT statsaut. revisorar Sp/f.

Nýggja navnið og leysari tilknýtið til KPMG fáa ongan praktiskan týdning fyri okkara kundar, starvsfólk og viðskiftafólk annars. Tær tænastur, sum vit bjóða, halda fram óbroyttar.

SPEKT statsaut. revisorar

Spekt er skynsemi og hygni. At vera skilagóður og umhugsin. Tilsamans umboða hesi orðini tað, sum vit standa fyri.

**KPMG statsaut. revisorar Sp/f**
kpmg@kpmg.fo • www.kpmg.fo

Tórshavn
Staravegur 17
Postboks 3258
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Saltangará
Heiðavegur 15
Postboks 190
Telefon 34 34 54
Telefax 474 475

KPMG